# Skaðaveður í Vági

*Í Toftalíð í Vági kláraðu eini hús ikki at veita skýli móti landsnyrðingi norði týsdagin. Yvirtromin reiv og gjørdi eitt sindur av skaða á nøkur grannahús*

EDVARD JOENSEN

Tann bletturin, sum annars hevur veitt skýli í nógv ár, orkaði ikki meira seinnapartin tysdagin. Tá reiv í Toftalíð í Vági.

Sommer Joensen, sýslumaður í Suðuroy, sigur, at øll yvirtromin í sunnaru síðu á einum húsum í Vági fór í luftina og gjørdi eitt sindur av skaða á onkur grannahús. Eitt petti fór niður gjøgnum takið á einum øðrum húsum, meðan okkurt smávegis feyk á tøkini í grannalagnum.

Ættin var landnyrðingur norðan við rættiliga hørðum hvirlum, sigur sýslumaðurin. Upp í harðan storm. Og tað er ring ætt har, sum støðan eisini vísir. Talan er um betonghús, sum eru stoypt heilt upp í tróðrið. Men timbri í erva helt altso ikki. Har fóru bæði tak og sperrur og tað heila, sigur Sommer Joensen. Bjargingarfelagið plagar í slíkum førum at leggja prosendingar oman yvir, men har var eingin sperra eftir at hefta í, so neyðugt var bara at leggja trol fyri at verja fyri, at tað skuldi fúka meira.

Av øðrum var tíbetur einki hent í illveðrinum sigur sýslumaðurin. Hann leggur aftrat, at frá einum trolara, sum kom á Vág seinnapartin í týsdagin, hevði hann frætt, at teir ikki høvdu verið á sjógv í verri veðri enn tað sama.

Okkurt smávegis ferðsuóhapp hevur verið orsakað av hálkuni og tí, at ikki hevur verið grivið og saltað.

Í Vágum fóru tveir bilar út av vegnum mánakvøldið. Eingin skaði stóðst tó av.

Í gjáramorgunin fór ein bussur hjá Bygdaleiðum út av vegnum vestan fyri bergholsmunnan oman fyri Norðskála. Av politistøðini í Havn varð sagt, at bussurin hekk á búkinum í vegkantinum, men øll ferðafólkini vóru farin úr honum í øllum góðum. Tað hendi ongum teirra nakað sum helst.

Í aðrar mátar var rutukoyringin óreglulig í gjár. Úr Vágum kom eingin bussur tann fyrsta túrin, og Leið 400 úr Leirvík var seinkað eina løtu, tí Ternan hevði trupulleikar við at leggja at.

Annars varð sagt av politistøðini í Havn, at ein sjúkrabilur úr Vágum fekk hjálp frá eini maskinu hjá Landsverkfrøðinginum, so hann slapp til Havnar við einum sjúklingi, sum skuldi á Landssjúkrahúsið.



*Ódnarveðrið setti síni spor kring landið týsdagin. Í Vági reiv yvirtromin á einum sethúsum, sum standa í Toftalíð. Bjargingarfelagið plagar at leggja prosendingar oman yvir, men í hesum føri var einki at festa í, tí sperrur, tak og tað heila reiv, sigur sýslumaður í oynni*

**savnsmynd í dýrdarveðrið**

# Stór krøv um óheftni og fjølbroytni sett kringvørpunum

*Tí taka átjan tingmenn undir við uppskotinum hjá Dan R. Petersen um at broyta løgtingslógina um kringvarp*

ÓLAVUR Í BEITI

– Hetta løgtingslógaruppskotið tryggjar, at avvarðandi landsstýrismaður hvørki tilvitað ella av ósketni setir sítt egna fólk í viðkomandi nevndir. Og tað tryggjar stóra fakliga breidd.

– Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya eru miðlar hjá øllum landsins borgarum. Tí verða eisini stór krøv um óheftni og fjølbroytni sett kringvørpunum og teirra nevndum. Tann fakliga breiddin verður tryggjað við tilmælum frá teimum 9 í lógaruppskotinum nevndu stovnum og feløgum. Programmnevndirnar skulu vera politiskt óheftar. Tað má als ikki vera illgruni um politiska slagsíðu, tí so fer trúvirðið, sigur Dan R. Petersen m.a. í viðmerkingunum til uppskotið.

### Átjan tilmæla

Í broytta lógartekstinum verður m.a. sagt, at landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum setir eina 9 manna nevnd at ráðgeva Útvarpi Føroya og Sjónvarp Føroya viðvíkjandi programmvirkseminum. Niðanfyri nevndu stovnar tilmæla sum nevndarlimir ein mann og eina kvinnu, harav landsstýrismaðurin tilnevnir annan sum lim: Fróðskaparsetur Føroya, Kristiligt hyggjara- og lurtarafelag, Føroya Ungdómsráð, 7 mannabólkurin av yrkisfeløgum (Føroya Arbeiðarafelag, Starvsmannafelagið, Sjúkrasystrafelagið, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Handverkarafeløgini í Føroyum og Fiskimannafelagið), Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Blaðmannafelag, Føroya Musikkskúli, Rithøvundafelag Føroya, og ÍSF.

Teir átjan tinglimirnir, sum tilmæla uppskotinum eru Katrin Dahl Jakobsen, Heðin Mortensen, Sámal Petur í Grund, Hans Pauli Strøm, Marjus Dam, Alfred Olsen, Kristian Magnussen, Jenis av Rana, Jákup Sverri Kass, Henrik Old, Jóanis Nielsen, Jógvan á Lakjuni, Bjarni Djurholm, Ingi Olsen, Rúna Sivertsen, Lisbeth L.Petersen, Flemming Mikkelsen og Jógvan við Keldu.





# Økispsykiatriin fekst ongantíð at virka

*Tí loyvi eg mær enn eina ferð at vísa landsstýrismanninum á álitið, sum varð tilevnað 1990/91, og sum ber heitið: Psykiatriætlan ár 2000. Hetta álit hevur enn onga politiska viðgerð fingið, sigur Finnur Helmsdal m.a. í viðmerkingunum til fyrispurning um økispsykiatri*

ÓLAVUR Í BEITI

Finnur Helmsdal hevur sett fyrispurningur til Helenu Dam á Neystabø, landsstýrismann, viðvíkjandi økispsykiatri, og spyr Finnur Helmsdal, um landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur ítøkiligar ætlanir um at fáa økispsykiatriina í Føroyum at virka, sum ætlað? Um so er, hvørjar? Og vil Finnur Helmsdal at enda hava at vita, hvør tíðarætlanin er hesum viðvíkjandi?

### Nógv liggur á láni

Í drúgvu viðmerkingunum, sigur Finnur Helmsdal m.a., at nógvar eru abøturnar á arbeiði innan psykiatriina í Føroyum, sum enn liggja á láni. Og tað skal vera mín vón, at landsstýrismaðurin og onnur ábyrgdarfólk fara at vakna beinanvegin, soleiðis at tey kunnu fara undir at loysa hesar stóru trupulleikar Og mælir Finnur Helmsdal til, at landsstýrismaðurin, so skjótt til ber, fer undir at endurskoða økispsykiatriina. Endurskoðað hesa skipan við tí fyri eyga, at hon skal virka eftir ætlan

– Skal økispsykiatriin virka, er neyðugt, at skipanin fevnir um annað, enn hon ger nú, nevniliga at yvirlækni saman við hjálparfólki fer regluliga út í ávís øki. Tað er neyðugt, at skipanin støðugt hevur fólk á staðnum. Tað vil siga, at vit skulu hava sokallað økispsykiatriskt team úti í nøkrum økjum kring landið. Eitt slíkt team er vanliga mannað við sjúkrasystur, sosialráðgeva og psykologi.

– Men einki forðar fyri, at eisini ergoterapeutar, fysioterapeutar og onnur heilsustarvfólk eru við á liðnum, sigur Finnur Helmsdal

### Broyta hugburð

– Undirritaði fer at enda at loyva sær at heita á landsstýrismannin um at taka stig til eitt breitt orðaskifti um viðurskiftini hjá sálarliga sjúkum í Føroyum. Innan tinggátt sum uttanfyri. Hetta fyri at broyta og menna hugburðin hjá øllum føroyingum, tá tað snýr seg um sálarliga sjúku.

– Politikarar og embætisfólk teirra mugu broyta hugburð soleiðis, at tað fer at kennast sum ein sjálvfylgja at játta tað neyðuga. Samfelagið má broyta hugburð soleiðis, at sálarliga sjúk gerast ein sjálvsagdur partur av tilveruni. Við javnbjóðis umstøðum og teimum treytum, sum krevjast.

– Tí loyvi eg mær enn eina ferð at vísa landsstýrismanninum á álitið, sum varð tilevnað 1990/91, og sum ber heitið: Psykiatriætlan ár 2000. Hetta álit verður sostatt skjótt 10 ára gamalt, og tað hevur enn onga politiska viðgerð fingið. Við fáum nútíðargeringum er tað enn nýtiligt sum grundarlag undir einum skikkaðum orðaskifti um málið. Innan- sum uttan fyri tinggáttina, sigur Finnur Helmsdal m.a. í viðmerkingunum til fyrispurningin.



# Sisimiut fiskað fyri 16 milliónir

*Skal umvælast á Tórshavnar Skipasmiðju áðrenn hann fer aftur í Barentshavið*




*Grønlendski flakatrolarin Sisimiut liggur í løtuni á Havnini, har hann skipar upp veiðina, sum er 420 tons. Hann fer av Havnini aftur páskaaftan*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

JOHN JOHANNESSEN

Grønlendski flakatrolarin, Sisimiut, er komin á Havnina at skipa veiðu sína upp til Skipafelagið Føroyar. Trolarin hevur verið til fiskiskap í norska partinum av Barentshavinum, og hevur hann fiskað 420 tons av flaki. Hetta hevur, við dagsins prísum, eitt virðið á 16 milliónir krónur, verður sagt í tíðindaskrivi.

Sisimiut skal eisini umvæla onkur smávegis brek á Tórshavnar Skipasmiðju, áðrenn hann páskaaftan fer aftur í Barentshavið at fiska.

# Brillant seldur




*Ísfiskatrolarin Brillant er seldur úr Runavík til Leirvíkar*

EDVARD JOENSEN

Ísfiskatrolarin Brillant er seldur úr Runavík til Leirvíkar.

P/F Snaraløkur hevur selt Polarstjørnuni í Leirvík trolaran. Reiðarin, Jónsvein Knudsen, vil ikki upplýsa søluprísin. Men hann sigur, at báðir partar eru nøgdir við prísin.

Jónsvein Knudsen sigur, at tað er ikki tí, at teir hava nakað nýtt á borðinum, at skipið verður selt beint nú. Talan er bara um vanliga forrætning, sigur hann og leggur aftrat, at hann skal siga frá aftur um eini tvey ár, hvørt hetta var klókt ella ikki.

Brillant er seldur við øllum loyvum, sigur hann. Men samstarvið við Smaragd, sum Brillant hevur partrolað við, heldur tó fram.

Tað vóru fimm mans við Brillant, og teir eru uppsagdir, nú skipið er selt. Nýggju eigararnir høvdu aðra manning til skipið, sigur Jónsvein Knudsen. Tó er meistarin tann sami, sigur hann.

# Fiskaídnaðurin hevur tvær rávørur - fisk og fólk

*– At leggja strategi fyri hvussu vit fáa fatur á aðrari rávøru enn tí føroysku, verður ein tann størsta avbjóðingin fyri føroysku fiskivinnuna framyvir. Tí má fiskiídnaðurin vera kappingarførur við útlendsku vinnuna, sigur Mainhard Jacobsen, stjóri á Fiskavirking*

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum og í tíðindaskrivi stendur grein eftir Mainhard Jacobsen, stjóra í Fiskavirking, og verður greinin endurgivin her í síni fullu longd. Mainhard Jacobsen skrivar:

Føroysku myndugleikarnir mugu tryggja, at veiðan undir Føroyum fer fram á ein burðardyggan hátt, soleiðis at rávørutilgongdin til virkini verður so jøvn sum gjørligt. Krøv um burðardygga veiðu og umsiting, koma ikki bert frá føroysku vinnuni, men eisini frá keyparalondum - myndugleikunum og teimum einstøku keypunum.

Vinnan má duga at tillaga seg knappligar broytingar í atgongdini eftir rávøru, sum koma orsaka av, at tilgongdin til fiskastovnarnir er ymisk ár undan ári. Virkini mugu skjótt kunna leggja framleiðsluna um ella hvat tørvur nú er á, fyri at viga upp fyri náttúrufyribrigdunum.

### Framtíðin

Føroyski fiskiídnaðurin má leggja seg eftir at virka hávirðisvørur og rávøran má nýtast betri soleiðis, at størri partur av fiskinum verður gagnnýtur í framleiðsluni. Hetta kann gerast við at menna aðrar framleiðslur burturúr tí partinum av fiskinum, sum í dag hevur lægsta virðið.

Í framtíðini hevur tað stóran týdning at leggja dent á góðskustýringa. Góðskustýringin skal tryggja, at tær vørur, ið verða virkaðar, hava tað góðsku, keyparin væntar og verða virkaðar undir tryggum umstøðum, soleiðis at heilsan hjá brúkarunum ikki kemur í vanda.

Automatisering av arbeiðum á virkjunum verður ein neyðug gongd. Arbeiði í fiskiídnaðinum er mangan tungt og einsháttað. Nýggj tøkni er komin og vil í framtíðini avloysa tunga arbeiðið í vinnuni.

Virkini mugu í ein ávísan mun spesialisera seg. Spesialiseringin skal gerast uttan, at virkini missa liðiligheit og evnini til at umleggja framleiðsluna um neyðugt.

Ein partur av fyritreytunum fyri øllum hesum er samskifti. Neyðugt er at kunna samskifta skjótt við veitarar og keyparar. Ein partur av hesum arbeiðnum verður gjørdur við at vinnan í framtíðini eisini fer at brúka ehandil, sum eitt amboð fyri samskifti.

Marknaðarføring av fiskaúrdráttum sum reinar og heilsugóðar vørur, og vørur har vandin fyri heilsustøðuni hjá brúkaranun ikki er til staðar, er somuleiðis týdningarmikið.

### Avbjóðingar til starvsfólkið

Fiskaídnaðurin hevur tvær rávørur — fiskur og fólk. Tað er ofta at hoyra millum arbeiðsfólk í fiskiídnaðinum, *at tey bara arbeiða á flakavirki, og at tey verða har til annað arbeiðið er at fáa.*

Tað hevur sera stóran týdning, at fískivinnan í framtíðini ger íløgur í menninskjaligar eginleikar. Hetta skal gerast fyri at fáa fiskiídnaðin til attraktivt arbeiðspláss, har starvsfólkinum er tryggjað góðar arbeiðsumstøður og lønarviðurskifti, sum kunnu kappast við onnur størv. Í framtíðini verða íløgur gjørdar í automatisering, soleiðis at arbeiði broytist frá at vera tungt kroppsligt arbeiði, til at verða yvirvøka av framleiðsluni. Til hesi arbeiði krevst útbúgvi fólk.

Við at útbúgva fólki og skapa góðar umstøður hjá arbeiðsfólkinum, hevði borið til at lyft fiskiídnaðin upp á hægri støði.

### Arbeiði hjá myndugleikunum

Føroysku myndugleikarnir skulu tryggja vinnuni góðar arbeiðsumstøður. Hetta kann gerast við at virkini fáa betri tilgongd til rávøru. Myndugleikarnir skulu skapa markn-aðaratgongd, soleiðis at føroyskar vørur kunnu seljast har besti prísurin fæst.

Myndugleikarnir skulu somuleiðis syrgja fyri, at føroysk vinna fær tær tænastur, (orka, ravmagn samskifti o.tíl.) sum vinnan hevur brúk fyri, til kappingarførar prísir.

### Framtíðin

Soleiðis sum framtíðin sær út, kann ein vænta, at færri og færri fólk verða í fiskivinnuni í framtíðini - færri sjómenn og færri fólk í fiskiídnaðinum.

Arbeiðsplássini verða broytt til, at arbeiðsfólkini fylgja við hvussu framleiðslan gongur og arbeiði gerst minni kropsligt. Arbeiðstíðirnar vera flekstíðir, har arbeiðsfólki í ávísan mun hevur ávirkan á, nær arbeitt verður. Tað vil eisini gerast alt meira vanligt, at fólk hava heimaskrivstovu og gera sítt arbeiði har frá.

Keyp og søla og øll avgreiðsla av papíri verður avgreitt av elektronisku miðlunum.

Rávøran verður gagnnýtt betur og fiskaúrdráttir, virkaðir úr tí vit í dag kalla slógv, til pharmaseutiskan ídnað verður gerandis.

Ein áhugaverður spurningur at seta er: Hvør verður okkara høvuðsvinna í framtíðini?

Verður tað: Fiskivinnan, alivinnan, oljuvinnan, KT-vinnan ella ferðavinnan.

Einki er at ivast í, at føroyska høvuðsvinnan verður fiski- og alivinnan.

